Postboks 2 . FO-710 Klaksvík . Føroyar . Tlf. 410000

# Klaksvíkar Býráð

**Dagfesting:** 29.10.2026 kl. 17:30
**Málnr.:** 24/01278 Gerðabók
Nevndarlimir: Karl H. Johansen, Annika S. Biskopstø, Signhild V. Johannesen, Hermann R. Samuelsen, Anfinn í Toft, Sylvia Thomsen, Jógvan Skorheim, Oddmar á Lakjuni, Eyðstein Ó. Poulsen, Fríðin Ziskason og Atli S. Justinussen
Varalimir:
Ikki møtt:
Onnur: Sonni Ó. Djurhuus, kommunustjóri
Protokollførari: Jensa Anthoniussen, journalfulltrúi

| | | |
|---|---|---|
| **Málsyvirlit** | | |
| **Til viðgerðar** | | |
| 116/26 | 23/00572-20 | Bátafelagshúsið |
| 117/26 | 26/00894-33 | Góðkenning av fíggjarætlan Klaksvíkar Sløkkiliðs 2027 |
| 118/26 | 26/00702-5 | Sundurbýti í eigaraíbúðir, matr.nr. 1005i |
| 119/26 | 26/00984-6 | Sundurbýti í eigaraíbúðir, matr.nr. 751i |
| 120/26 | 26/01057-2 | Byggiloyvi til skerm, matr.nr. 385 |
| 121/26 | 26/01145-2 | Loyvi til lántøku, sjálvsognarstovnurin Gloria Fastogn |
| 122/26 | 26/00022-54 | Serflutningsskipanin, mist endurgjald av virðisavgjaldi - *flyting frá rakstri til íløgur, fyrra viðgerð* |
| 123/26 | 25/00395-7 | Kostpolitikkur fyri kommununa – *eykajáttan, seinna viðgerð* |
| **Til viðgerðar fyri afturlatnum hurðum** | | |
| 124/26 | 24/00252-3 | Ognan av lendi |
| 125/26 | 26/00816-2 | Lendi |
| 126/26 | 26/01006-3 | Meiriøki |
| 127/26 | 26/01183-2 | Skattafrælsi |

**Til viðgerðar**

## 116/26
## 23/00572-20 Bátafelagshúsið

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. |
|---|---|---|
| 1 Mentanarnevndin | 20.10.2026 | 66/26 |
| 2 Havna- og Vinnunevndin | 21.10.2026 | 64/26 |
| 3 Klaksvíkar Býráð | 29.10.2026 | 116/26 |

**23/00572-20 Bátafelagshúsið**

**Frágreiðing um málið:**
Málið um at byggja sølutorg og bátafelagshús á økinum niðanfyri EFFO hevur verið viðgjørt og fyrireikað í eina tíð. Arbeitt hevur verið út frá einum leisti, har kommunan í samstarvi við privatar aktørar kann fáa bygt og rikið bygningin, meðan kommunan tryggjar, at bygningurin kann nøkta almennan og felags tørv á økinum.

Í arbeiðinum eru gjørdar fyribils skitsur og hugmyndir, sum arkitektur hevur staðið fyri. Skitsurnar lýsa møguliga staðseting, sniðgeving og innihald í bygninginum. Ætlanin hevur verið, at bygningurin skal fevna um bæði sølutorg, almenn vesir, vaskifasilitetir og høli til bátafelagsvirksemi og soleiðis vera ein natúrligur partur av maritima umhvørvinum á havnalagnum.

Harumframt hava samrøður verið við privatar áhugapartar um møguleikan at luttaka í verkætlanini, bæði við atliti at bygging, fígging og rakstri. Endamálið hevur verið at kanna, um ein skipan kann gerast, har privatur aktørur stendur fyri sjálvari byggingini og eigur bygningin, meðan kommunan og aðrir brúkarar leiga neyðug høli.

Málið er nú komið á eitt stig, har støða eigur at verða tikin til, hvørt arbeitt skal verða víðari eftir teimum fortreytum og skitsum, sum higartil eru lagdar fram, ella um verkætlanin skal endurskoðast og byrja av nýggjum við øðrum loysnum/møguleikum, staðsetingum ella bygnaðarligum fortreytum.

**Burðardygd og heimsmálini:**
-

**Lógargrundarlag:**
Kommunufulltrúin

**Fíggjarligar avleiðingar:**
Ongar fíggjarligar avleiðingar.

**Tilmæli:**
Mælt verður til, at nevndin tekur støðu til, um arbeiðast skal víðari við verandi verkætlanarleisti og teimum skitsum, sum eru útarbeiddar, ella um umsitingini verður álagt at fyrireika eitt nýtt grundarlag fyri málið.

**Mentanarnevndin 20. oktober 2026:**
Ein minniluti, SVJ og ASB, mælir til at fyrireika nýtt grundarlag fyri málið.
Ein annar minniluti, ASJ og EÓP, mælir til at arbeiða víðari við verandi verkætlan.

**Havna- og Vinnunevndin 21. oktober 2026:**
SVJ tekur undir við fyrra minnilutanum í MeN 20-10-2026.
OáL tekur undir við seinna minnilutanum í MeN 20-10-2026.
ST, AíT og FZ taka støðu í býráðnum.

**Klaksvíkar Býráð 29. oktober 2026:**
Atkvøtt varð um at taka undir við verandi verkætlan; tað varð samtykt við 9 atkvøðum fyri (KHJ, HRS, AíT, ST, JS, OáL, EÓP, FZ og ASJ) og 2 atkvøðum ímóti (ASB og SVJ).

## 117/26
## 26/00894-33 Góðkenning av fíggjarætlan Klaksvíkar Sløkkiliðs 2027

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. |
|---|---|---|
| 1 Tekniska Nevnd | 21.10.2026 | K-22/26 |
| 2 Fíggjarnevndin | 27.10.2026 | K-15/26 |
| 3 Klaksvíkar Býráð | 29.10.2026 | 117/26 |

**26/00894-33 Góðkenning av fíggjarætlan Klaksvíkar Sløkkiliðs 2027**

**Frágreiðing um málið:**
Kommunurnar í Norðoyggjum samstarva um tilbúgving gjøgnum samstarvið "Klaksvíkar Sløkkilið", har samstarvsavtala millum partarnar ásetir fíggingina. Kommunustýrini skulu góðkenna fíggjarætlanina eftir tilmæli frá tilbúgvingarnevndini. Tilbúgvingarnevndin hevur 08-09-2026 heitt á kommunustýrini í samstarvinum um at viðgera og góðkenna fíggjarætlanina fyri Klaksvíkar Sløkkilið fyri 2027.

Tilbúgvingarnevndin hevur samtykt eina rakstrarjáttanin upp á 3.125.450 kr. og íløgur upp á 1.200.000 kr.

*"Nevndin tekur undir við rakstrar- og fíggjarætlanini, dagf. 19-08-2026, men mælir til at hækka avsetingina á kontonr. 19 Ymsar rakstrarútreiðslur við 150 tús.kr. Harumframt einmælt samtykt at seta 1,2 mió.kr. av á íløgum til samskiftisútgerð og sløkkiliðsbát."*

Fíggjarligi býtislykilin millum kommunurnar í samstarvinum byggir á talið av borgarum í kommununum pr. 31. desember 2025.

**Lógargrundarlag:**
Tilbúgvingarlógin
Samstarvsavtala millum kommunurnar í Norðoyggjum um tilbúgving

**Fíggjarligar avleiðingar:**
Um tikið verður undir við tilmælinum, má rakstrarjáttanin á 2.668.509 kr. og íløgujáttanin upp á 1.024.560 kr. takast við í kommunalu fíggjarætlanina fyri 2027.

**Tilmæli:**
Mælt verður til at góðkenna fíggjarætlanina fyri Klaksvíkar Sløkkilið fyri 2027, sum samtykt av tilbúgvingarnevndini 7. september. 2026.

**Tekniska Nevnd 21. oktober 2026:**
Tilmælið, dagf. 12-10-2026, verið til kunningar.

**Fíggjarnevndin 27. oktober 2026:**
Tilmælið, dagf. 12-10-2026, verið til kunningar.

**Klaksvíkar Býráð 29. oktober 2026:**
Tilmælið um rakstur, dagf. 12-10-2026, einmælt samtykt; íløguparturin verður tikin upp á temafundi II (íløgur).

## 118/26
## 26/00702-5 Sundurbýti í eigaraíbúðir, matr.nr. 1005i

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. |
|---|---|---|
| 1 Umhvørvis- og Býarskipanarnevndin | 19.10.2026 | 115/26 |
| 2 Klaksvíkar Býráð | 29.10.2026 | 118/26 |

**26/00702-5 Sundurbýti í eigaraíbúðir, matr.nr. 1005i**

**Frágreiðing um málið:**
Talan er um sundurbýti til 24 eigaraíbúðir Oman Vallrætt. Byggiloyvi er útskrivað tann 13. apríl 2023. Umsóknin er í tráð við Almennu Byggisamtyktina fyri økið.

**Burðardygd og heimsmálini:**
Nr. 11 – Burðardyggir býir og býlingar

**Lógargrundarlag:**
Løgtingslóg nr. 11 frá 3. apríl 1970 um eigaraíbúðir
Løgtingslóg nr. 64 frá 11. des, 1962 um matrikulering og sundurbýti
Almenna Byggisamtyktin fyri Klaksvíkar Kommunu

**Fíggjarligar avleiðingar:**
Ongar – kommunan bert ummælandi.

**Tilmæli:**
Kommununnar ummæli er undansent Umhvørvisstovuni 16. juni 2026 og verður við hesum sent býráðnum til kunningar/staðfestingar.

**Umhvørvis- og Býarskipanarnevndin 19. oktober 2026:**
Nevndin staðfestir sundurbýtið, sum greitt frá í tilmælinum, dagf. 08-10-2026.

**Klaksvíkar Býráð 29. oktober 2026:**
Tilmælið frá UBN 19-10-2026 einmælt samtykt.

## 119/26
## 26/00984-6 Sundurbýti í eigaraíbúðir, matr.nr. 751i

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. |
|---|---|---|
| 1 Umhvørvis- og Býarskipanarnevndin | 19.10.2026 | 117/26 |
| 2 Klaksvíkar Býráð | 29.10.2026 | 119/26 |

**26/00984-6 Sundurbýti í eigaraíbúðir, matr.nr. 751i**

**Frágreiðing um málið:**
Talan er um sundurbýti til eigaraíbúðir. Byggiloyvi er útskrivað tann 12. febr. 2026. Sambært samtykt og umbidnari matrikulering er sundurbýtið í tráð við Almennu Byggisamtyktina fyri økið.

**Burðardygd og heimsmálini:**
Heimsmál nr. 11 – Burðardyggir býir og býlingar

**Lógargrundarlag:**
Løgtingslóg nr. 11 frá 3. apríl 1970 um eigaraíbúðir
Løgtingslóg nr. 64 frá 11. des, 1962 um matrikulering og sundurbýti
Almenna Byggisamtyktin fyri Klaksvíkar Kommunu

**Fíggjarligar avleiðingar:**
Ongar – kommunan ummælandi partur

**Tilmæli:**
Kommununnar ummæli er undansent Umhvørvisstovuni 29. sept. 2026 og verður við hesum sent býráðnum til kunningar/staðfestingar.

**Umhvørvis- og Býarskipanarnevndin 19. oktober 2026:**
Nevndin staðfestir sundurbýtið, sum greitt frá í tilmælinum, dagf. 08-10-2026.

**Klaksvíkar Býráð 29. oktober 2026:**
Tilmælið frá UBN 19-10-2026 einmælt samtykt.

## 120/26
## 26/01057-2 Byggiloyvi til skerm, matr.nr. 385, Klaksvík

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. |
|---|---|---|
| 1 Ferðslunevndin | 19.10.2026 | 42/26 |
| 2 Umhvørvis- og Býarskipanarnevndin | 19.10.2026 | 122/26 |
| 3 Klaksvíkar Býráð | 29.10.2026 | 120/26 |

**26/01057-2 Byggiloyvi til skerm, matr.nr. 385, Klaksvík**

**Frágreiðing um málið:**
Fyritøka hevur søkt um byggiloyvi til at seta upp tveir talgildar lýsingaskíggjar á bygningin á matr.nr. 385, Klaksvík. Skermarnir verða settir á norður- og suðursíðuna av bygninginum fram við Klaksvíksvegnum.

Ognin liggur í øki A5 og er ætlað til blandað íbúðar- og vinnuøki.

Hvørki galdandi økisásetingar fyri A5, almenni ásetingarteksturin hjá Klaksvíkar kommunu ella BK17 hava serligar ásetingar um talgildar lýsingaskíggjar. Tekniska fyrisiting hevur tí mett um málið út frá almennum atliti at ferðslutrygd, ljósdálking, heildarútsjónd og konstruktión.

Tekniska fyrisiting metir, at uppsetan av skermunum ikki eru í stríð við galdandi ásetingar. Tó eigur at verða tryggjað, at skermarnir ikki verða til ampa fyri ferðslutrygdina, grannaviðurskifti ella almenna rúmið.

**Burðardygd og heimsmálini:**
-

**Lógargrundarlag:**
- Galdandi byggisamtykt fyri Klaksvíkar kommunu.
- Økisásetingar fyri A5-økið.
- BK17 - Bygningskunngerðin.

Hvørki BK17 ella galdandi byggisamtykt hava serstakar ásetingar um talgildar lýsingaskíggjar.

Málið er tí viðgjørt við støði í galdandi ásetingum og vanligum fyrisitingarligum atlitum um ferðslutrygd, umhvørvi og býarmynd.

**Fíggjarligar avleiðingar:**
Málið hevur ongar fíggjarligar avleiðingar fyri Klaksvíkar kommunu.

**Tilmæli:**
Tekniska fyrisiting mælir til:

1. at byggiloyvi verður givið til uppsetan av tveimum talgildum lýsingarskíggjum sambært innsendum umsóknar- og tekningartilfari, at:
    - **Ljósstyrki**: Skermurin skal hava automatiskan ljósfølara, so ljósstyrkin verður lagað eftir dagsljósi og myrkri.
    - **Ferðslutrygd**: Skermurin má ikki vera til ampa fyri ferðsluna ella órógva ferðslutrygdina á Klaksvíksvegnum. Blinkandi ljós, skjótt myndaskifti ella annað órógvandi innihald er ikki loyvt.
    - **Grannaviðurskifti**: Skermurin má ikki elva til munandi ampa fyri grannaognir ella nærumhvørvið.
    - **Eftirlit**: Kommunan kann krevja tillagingar í rakstrinum, um skermurin vísir seg at elva til ampa fyri ferðslu ella nærumhvørvið.
2. at tekniska fyrisiting fyrireikar uppskot til skeltisreglugerð fyri skelting og talgilda lýsing til politiska viðgerð, soleiðis at greiðari karmar verða settir fyri líknandi mál frameftir.

**Ferðslunevndin 19. oktober 2026:**
Nevndin tekur undir við tilmælinum, dagf. 08-10-2026. Nevndin mælir til at fylgja krøvunum undir pkt. 1 neyvt.

**Umhvørvis- og Býarskipanarnevndin 19. oktober 2026:**
Ein meiriluti, AíT, HRS og EÓP, tekur undir við FeN 19-10-2026 og leggur áherðslu á at ferð verður sett á arbeiðið at gera eina skeltisreglugerð at leggja fyri nevndina aftur.
Ein minniluti, ASB, tekur undir við pkt. 2 í tilmælinum, dagf. 08-10-2026, og ynskir ljóð- og ljósdálking sett á breddan.

**Klaksvíkar Býráð 29. oktober 2026:**
*Jógvan Skorheim luttók ikki í viðgerðini av málinum vegna ógegni.*
Atkvøtt varð um meirilutatilmælið frá UBN 19-10-2026; tað varð samtykt við 7 atkvøðum fyri (KHJ, HRS, AíT, OáL, EÓP, FZ og ASJ) og 2 atkvøðum ímóti (ASB og SVJ). ST atkvøddi ikki.

## 121/26
## 26/01145-2 Loyvi til lántøku, sjálvsognarstovnurin Gloria Fastogn

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. |
|---|---|---|
| 1 Fíggjarnevndin | 27.10.2026 | 108/26 |
| 2 Klaksvíkar Býráð | 29.10.2026 | 121/26 |
| 3 Trivnaðarnevndin Eldri og Bústaðir | 17.11.2026 | |

**26/01145-2 Loyvi til lántøku, sjálvsognarstovnurin Gloria Fastogn**

**Frágreiðing um málið:**
Sjálvsognarstovnurin Gloria Fastogn hevur sent kommununi umsókn um loyvi til lántøku og veðsetan av Stangavegi 16 í sambandi við útbygging.

**Lógargrundarlag:**
Á býráðsfundinum 31. oktober 2024 samtykti býráðið einmælt at góðkenna:
- uppskot til viðtøkur fyri sjálvsognarstovnin "Gloria Fastogn",
- uppskot til leigusáttmála millum KK og Gloria Fastogn.

"**Samtyktir fyri sjálvsognarstovnin Gloria Fastogn**" áseta í § 3, Leiðsla, at "*Grunnurin verður teknaður við undirskrift av formanninum og minst einum øðrum nevndarlimi, men til veðsetan og sølu av føstum ognum ella* ***til upptøku av láni krevst góðkenning frá Klaksvíkar kommunu***".

**Fíggjarligar avleiðingar:**
"**LEIGUSÁTTMÁLI millum Soli Deo Gloria/Gloria Fastogn og Klaksvíkar kommunu**", ásetir í "Inngangur", at "*Treytir: Leigugjaldið verður at gjalda til eigara av ognini, sum nú er Soli Deo Gloria. Tá ið Gloria Fastogn hevur yvirtikið ognina, fellur leigugjaldið til Gloria Fastogn*".
Gloria Fastogn, upplýsir, at enn er teirra keyp av ognini frá SDG ikki tinglisið, men so skjótt tað er avgreitt, verður leigugjaldið frá KK at flyta á kontu hjá Gloria Fastogn.

Víðari er ásett í § 6 leigusáttmálanum um "Leigugjøld", at leigugjaldið pr. 01-07-2025 er 37.541,67 kr., og frá 01-07-2026 hækkar tað til 54.541,67 kr. Tað er henda hækking av leigugjaldinum, sum fer til fígging av rentum og avdráttum til bankalánið, sum Gloria Fastogn nú biður um loyvi frá kommununi til at taka.

Henda lántøka hjá "sjálvsognarstovninum Gloria Fastogn" er í tráð við áður gjørdar samtyktir í nevndum og býráð, har hesi viðurskifti verða útgreinað, og har tað framgongur, at henda nú aktuella lántøkan hjá Gloria Fastogn á 6 mkr. er partur av tí tá samtyktu ætlanini.

**Tilmæli:**
Vísandi til omanfyristandandi og viðfestu fortreytir og samtyktir, verður málið við hesum lagt fyri Trivnaðarnevndina eldri og bústaðir, Fíggjarnevndina og býráðið við tilmæli um at góðkenna ætlaðu lántøkuna hjá sjálvsognarstovninum Gloria Fastogn á 6 mió. kr.

**Fíggjarnevndin 27. oktober 2026:**
Nevndin tekur undir við tilmælinum, dagf. 15-10-2026.

**Klaksvíkar Býráð 29. oktober 2026:**
Tilmælið frá FíN 27-10-2026 einmælt samtykt.

## 122/26
## 26/00022-54 Serflutningsskipanin, mist endurgjald av virðisavgjaldi - *flyting frá rakstri til íløgur, fyrra viðgerð*

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. |
|---|---|---|
| 1 Trivnaðarnevndin Eldri og Bústaðir | 20.10.2026 | 46/26 |
| 2 Fíggjarnevndin | 27.10.2026 | 109/26 |
| 3 Klaksvíkar Býráð | 29.10.2026 | 122/26 |
| 4 Klaksvíkar Býráð | 26.11.2026 | |

**26/00022-54 Serflutningsskipanin, mist endurgjald av virðisavgjaldi - flyting frá rakstri til íløgur**

**Frágreiðing um málið:**
Greitt verður nærri frá málinum í skrivi frá umsitingini, dagf. 18-09-2026.

Nýggjur serflutningsbussur varð keyptur fyrr í ár, samstundis sum gamli bussurin nú er seldur til hægstbjóðandi. Tað málið varð avgreitt á sama hátt sum seinast, tá ið serflutningsbussur varð keyptur, og íløgujáttanin svarar neyvt til væntaða íløgukostnaðin.

Í samskifti við Akstovuna er tó komið fram, at kommunan ikki eigur at fáa undantak fyri virðisgjøldum fyri serflutningsbussin. Avleiðingin er, at kommunan fær ein eykakostnað álagdan á 307.000 kr. ísv. hetta busskeypið.

Um bussurin hevur eina livitíð á 10 ár, er talan um góðar 30.000 kr. meir um árið, men hetta hjálpir tó ikki uppá støðuna í ár. Útreiðslan skal gjaldast í ár, og tí verður avleiðingin ein meirútreiðsla í 2026.

**Lógargrundarlag:**
Kommunustýrislógin ásetur, at ikki kann farast undir útreiðslur, uttan at játtan fyriliggur frammanundan.

**Fíggjarligar avleiðingar:**
Netto íløgukostnaðurin økist við 307.000 kr., úr 467.000 kr. upp í 774.000 kr.
Sostatt bjargar báligi raksturin í ár væntandi tveimum triðingum av meirkostnaðinum, sum kemur í av hesum mista endurgjaldi.
Umsitingin harmast um hetta mista endurgjald av virðisavgjaldinum, men samstundis kunnu vit gleðast um, at raksturin er blivin so nógv báligari.

**Tilmæli:**
Vísandi til omanfyristandandi og viðfestu skjøl, verður mælt til at gera tær í hesum tilmæli útgreinaðu flytingar millum kontur til fígging av mista endurgjaldinum í sambandi við keypið av nýggja serflutningsbussinum.

**Trivnaðarnevndin Eldri og Bústaðir 20. oktober 2026:**
Nevndin tekur undir við tilmælinum, dagf. 18-09-2026.

**Fíggjarnevndin 27. oktober 2026:**
Nevndin tekur undir við E&B 20-10-2026.

**Klaksvíkar Býráð 29. oktober 2026:**
Tilmælið frá FíN 27-10-2026 einmælt samtykt.

## 123/26
## 25/00395-7 Kostpolitikkur fyri kommununa - *eykajáttan, seinna viðgerð*

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. |
|---|---|---|
| 1 Trivnaðarnevndin Børn og Ung | 16.06.2026 | 30/26 |
| 2 Trivnaðarnevndin Eldri og Bústaðir | 16.06.2026 | 34/26 |
| 3 Fíggjarnevndin | 23.06.2026 | 69/26 |
| 4 Klaksvíkar Býráð | 25.06.2026 | 82/26 |
| 5 Klaksvíkar Býráð | 24.09.2026 | 105/26 |
| 6 Klaksvíkar Býráð | 29.10.2026 | 123/26 |

**25/00395-7 Kostpolitikkur fyri kommununa – Annika S. Biskopstø forkv. í TrN B&U**

**Frágreiðing um málið:**
Málið varð fyrru ferð samtykt av býráðnum 25. juni 2026.

**Lógargrundarlag:**
Kommunustýrislógin ásetur, at ikki kann farast undir eina nýggja útreiðslu, uttan at játtan fyriliggur frammanundan.

**Fíggjarligar avleiðingar:**
Enn er ilt at koma við nakrar neyvari kostnaðarmeting fyri hetta ætlaða arbeiði, men til tess at tryggja nóg mikið av peningi til eitt væl út hondum greitt tilmæli um kostpolitikk, verður mælt til at seta av 150 tkr. til hetta.

Mælt verður til at fíggja arbeiðið við niðanfyri útgreinaðu flyting millum kontur í inniverandi fíggjarári:

| Rakstrarstað nummar | Rakstrarstað navn | Projekt/kontu nummar | Projekt/kontu navn | Verandi játtan | **Broyting** | Broytt játtan |
|---|---|---|---|---|---|---|
| 04232270112 | Nýggjur skúli (íløga) | SKULI094 | Matarskipan | 1.000.000 kr. | **-150.000 kr.** | 850.000 kr. |
| 02211270030 | Heilsumál | 147901 | Sakkøn hjálp | 0 kr. | **+150.000 kr.** | 150.000 kr. |
| | | | | | **Netto: 0 kr.** | |

**Tilmæli:**
Biðið verður um heimild til at fara undir at orða ein kostpolitikk fyri Klaksvíkar kommunu eftir tí í hesum tilmæli útgreinaða leisti, sum verður fíggjaður við at flyta 150.000 kr. millum kontur frá íløgujáttanini til projektið "Matarskipan" og til eina rakstrarjáttan til rakstrarstaðið "Heilsumál" (ella annað rakstrarstað, um tað verður mett rættari bókhaldsliga), sum verður at liggja undir ræði hjá Trivnaðarnevndini Børn og Ung.

**Trivnaðarnevndin Børn og Ung 16. juni 2026:**
Nevndin samtykti at taka undir við tilmælinum frá umsitingini dagfest 03.06.2026.

**Trivnaðarnevndin Eldri og Bústaðir 16. juni 2026:**
Nevndin samtykti at taka undir við TrN B&U 16.06.2026.

**Fíggjarnevndin 23. juni 2026:**
Nevndin samtykti at taka undir við TrN E&B 16.06.2026, og at endalig manning av arbeiðsbólkinum verður løgd fyri komandi nevndarumfar.

**Klaksvíkar Býráð 25. juni 2026:**
Tilmælið frá FíN 23-06-2026 einmælt samtykt.

**Klaksvíkar Býráð 24. september 2026:**
Málið er útsett til seinni fund.

**Klaksvíkar Býráð 29. oktober 2026:**
Tilmælið frá BýR 24-09-2026 einmælt samtykt við seinnu viðgerð.

**FRAMMANFYRI STANDANDI MÁL ERU VIÐGJØRD Á ALMENNUM FUNDI**

## 124/26
## 24/00252-3 Ognan av lendi

## 125/26
## 26/00816-2 Lendi

## 126/26
## 26/01006-3 Meiríki

## 127/26
## 26/01183-2 Skattafrælsi

*Fundurin lokin kl. 19.45*